Tíðindaskriv

## Nýtt føroyskt heiðurstekin

Nærum øll lond í heiminum hava síni heiðursmerki, at vísa úrmælingum viðurkenning. Nú hava Føroyar eisini fingið sítt.

Ein føroyskur lagsfelagsskapur undir navninum "Vitin" er nú stovnsettur. Endamálið er at heiðra viðurkenningarverdar úrmælingar, sum hava framt vala avrik, ið eru við til at bera føroysku tjóðini framá.

Heiðurin kann veitast bæði føroyingum og útlendingum uttan mun til húðalit, politiska ella átrúnaðarliga sannføring. Og verður sýndur viðkomandi við handan av einum heiðursbrævi og heiðursmerki.

Heiðursbrævið er ein staðfesting í pappírsskjali, har boðað verður frá grundgevingunum fyri tilnevningini av viðkomandi.

Heiðursmerkið er silvur- ella gulllagt bringupríði, sum er krossur við oyggjunum í miðjuni og áskriftini "pro aris et focis" í bogaðum teksti omanfyri. Umframt sjálvt heiðursmerkið, hoyrir eisini ein silvur- ella gullløgd reversnál til.

Felagskapurin er óheftur av politiskum, átrúnaðarligum og fíggjarligum ella øðrum áhugamálum í síni meting av hvør verður heiðraður.

Ein lagsnevnd  hevur ábyrgdina av Vitanum og tekur allar avgerðir um heiðurin. Lógin fyri lagsnevndina er ikki almenn.

Fyrsta handan verður um hálvan mars í ár, har 3 persónar, hvør á sínum fakøki fáa heiðursmerki og heiðursbræv, sum eina tøkk fyri teirra íkast til menningina av føroyska samfelagnum.

Pro aris et focis
Vitin